# ENJO í miðbýnum




*Tórharda Bláhamar í framsýningarhølunum í Niels Finsensgøtu. Tórharda er útbúgvin ENJO-ráðgevi*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Nakað fyri jól lat ENJO-Føroyar v. Tórhardu Bláhamar upp eini framsýningarhølir við kendu eysturríksku ENJO-reingerðingsamboðunum í Niels Finsensgøtu 21 í Havn.

Enjo vørurnar verða gjørdar av "ENJO International" í Eysturríki og verða einans seldar av útbúnum ráðgevum, sum geva kundunum røttu veg-leiðingina.

Enjo produktini kunnu brúkast í øllum húsarhaldinum, og høvuðsendamálið er fara væl við umhvørvinum.

Alt hetta snýr seg í høvuðsheitum um vaskiklútar, ið eru gjørdir úr serstøkum tægrum. Hetta ger, at nýtslan av sápu og øðrum kemikalium kann minkast við 90 prosentum ella meira.

Sum fyritøka leggur ENJO stóran dent á at verja umhvørvið, og hava tey eina fullfíggjaða reingerðingsskipan, sum kann brúkast í húsarhaldinum, á stovnum, virkjum ella hvar tað skal vera. Eisini til bilar og bátar.

Framsýningarhølini eru opin gerandisdagar frá kl. 10 - 17.30 og leygardag frá 10 - 14. Eisini ber til at ringja á telefon 314353 ella 226603. Allir upplýsingar um ENJO eru at finna á heimasíðuni: www.enjo.net

Arbeiðsmenn hjá IRF:

# Hótta við uppsagnum

**14 posamenn og 10 menn, sum arbeiða í rottangaskipanini hjá IRF, hótta nú við at siga upp um nakar verður uppsagdur hjá felagsskapinum**

HÓTTAN
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Verður ein uppsagdur, so stinga allir av. Boðini frá 24 arbeiðsmonnum hjá IRF er greið. Teir finna seg ikki í, at fólk verða uppsøgd, og mótmælisskriv er sent leiðsluni hósdagin.

Ein arbeiðsmaður hjá IRF, sum Sosialurin hevur tosað við sigur, at sparingarnar, sum IRF tosar um, als ikki lata seg gera.

Fundur varð hildin við leiðsluna hósdagin um støðuna, og allir menninir hava skrivað undir skjal, sum sigur, at um ein verður uppsagdur, so rýma hinir.

Leiðslan skal senda út hoyringarskriv til teir, ið uppsagdir verða, og so skjótt tað brævið kemur fram, vænta arbeiðsmenninir ein nýggjan fund við leiðsluna.

# Føroya Arbeiðarafelag og arbeiðsfólkið hjá IRF seta hart móti hørðum

TÍÐINDASKRIV

Sum upplýst er í fjølmiðlunum, so hevur IRF í umbúna at siga fleiri arbeiðsfólk úr starvi.

Leiðsla felagsins sigur, at nevndu uppsagnir er liður í teimum sparingum, sum neyðugar eru.

Føroya Arbeiðarafelag og arbeiðsfólkið hevur fingið upplýst, at ætlanin er at gera munandi broytingar í mannagongdunum t.d. í sambandi við innsavningina, har ætlanin er at tey 5 innsavningarøkini nú skulu leggjast saman til 4 økir.

Arbeiðsfólkið hevur m.a. víst á:

- at nevndu uppsagnir og umleggingar fara at føra við sær, at arbeiðsbyrðan hjá arbeiðsfólkinum verður økt enn meira, uttan at lønin fer at hækka samsvarandi,
- at arbeiðsfólkið er samt um, at nokta at átaka sær hesa øktu arbeiðsbyrðu,
- at ógjørligt verður hjá arbeiðsfólkinum at klára hesar øktu arbeiðsbyrðuna,
- at um uppsagnirnar og umleggingarnar verða framdar, so fer IRF ikki at kunna røkja skyldur sínar móti komununum og borgarunum í limakommunum,
- at leiðslan fyri IRF ikki tykist hava skilt hvørjar avleiðingarnar av uppsagnunum og umleggingunum verða,
- at starvsfólkið í umsitingini støðugt er økt og at uml. 12 fólk nú starvast í umsitingini,
- at ætlaðu uppsagnirnar ikki fara at føra við sær nakrar sparingar.

Á fundi í Leirvík tann 8. januar varð einmælt samtykt at senda stjóranum fyri IRF skrivligt mótmæli, har víst verður á, at um uppsagnirnar verða framdar, so má leiðsla standa við ábyrgdini fyri teimum avleiðingum hetta fer at hava.

Hjálagt er orðingin av nevnda mótmælisskrivi, sum eisini verður sent nevndini fyri IRF og limakomununum.

Bæði Føroya Arbeiðarafelag og arbeiðsfólkið vóna, at nevndin og limakommunurnar fara at taka stig til, at nevndu uppsagnir ikki verða framdar, tí hesar ætlanir eru enn eitt dømi um, at ein leiðsla ikki megnar uppgávur sínar, og so brúkar arbeiðsfólkið sum syndabukk, og hetta fer Føroya Arbeiðarafelag ikki at góðtaka.

*Tórshavn, 09. januar 2004*
**Føroya Arbeiðarafelag**



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

# Mótmælisskriv

Tann 8. januar 2004 var fundur hildin í Leirvík, har umboð fyri Føroya Arbeiðarafelag, Leirvíkar Arbeiðarafelag umframt arbeiðsfólkið, sum starvast hjá IRF var møtt.

Evnið á fundinum var ætlanin hjá leiðsluni fyri IRF, at siga fólki út starvi og umlegging av virksemi felagsins.

Fundarluttakararnir staðfestu:

- at ætlanin hjá leiðsluni fyri IRF fer at økja munandi um arbeiðsbyrðuna hjá arbeiðsfólkinum, uttan at lønin fer at hækka samsvarandi,
- at ógjørligt verður hjá arbeiðsfólkinum, at klára arbeiðsuppgávurnar, sum lagdar verða á tey, um ætlaðu umlegginarnar og uppsagnirnar verða framdar,
- at arbeiðsfólkið er samt um, at nokta at átaka sær øktu arbeiðsbyrðurnar, tí tað er óforsvarligt at áleggja fólkinum hesa økta arbeiðsbyrðu,
- at verandi arbeiðsbyrða er ríkuliga stór sum er,
- at talið av fólkið í umsitingini hjá IRF alsamt er økt, og at uml. 12 fólk nú starvast í umsitingini,
- at leiðslan kortini ikki tykist hava kannað møguleikan fyri sparingum í umsitingini,
- at leiðslan fyri IRF ikki tykist hava skilt tær avleiðingar, ætlaðu broytingarnar í arbeiðsgongdina og uppsagnirnar fara at føra við sær,
- at rættuliga vist er, at ætlaðu uppsagnir og umleggingarnar ikki fara at geva nakrar sparingar, men hinvegin helst fara at økja rakstararútreiðslur felagsins.

Eisini staðfesti fundurin, at um uppsagnirnar og umleggingarnar verða framdar so verður avleiðingin:

- at IRF ikki kann røkja skyldur sínar mótvegis kommununum,
- at ætlaðu umleggingarnar fara at gera, at tænastustøðið hjá IRF alsamt fer at lækka, hóast fólkatalið í kommununum alsamt økist,
- at posarnir, sum innsavnaðir verða, ikki rúmast í bilinum,
- at rottangarnir fara at standa fullir, og at talið av áheitanum um akuttøming fer at økjast munandi,
- at veruligur ruðuleiki verður í sambandi við innsavningina.

Fundarluttakararnir vilja tí við hesum harliga mótmæla ætlaðu uppsagnunum, og heita á Føroya Arbeiðarafelag, um at taka sær av málinum, og í hesum sambandi taka øll neyðugt stig, fyri at forða fyri at uppsagnirnar verða framdar.

Avgjørt er, at handa stjóranum fyri IRF hetta mótmæli okkara, og vit gera staðiliga vart við, at um uppsagnirnar verða framdar, so má leiðsla felagsins standa við ábyrgdini fyri teimum avleiðingum hetta fer at hava, bæði fyri tænastuna, mótvegis kommununum og borgarunum, og eisini fyri teimum tiltøkum, sum Føroya Arbeiðarafelag fer at seta í verk fyri at tryggja limunum rættindi teirra.

*Leirvík, tann 8. januar 2004*
**Vegna Føroya Arbeiðarafelag**
**Ingeborg Vinther**

**Vegna Arbeiðsfólkið**

Avrit av hesari fundarfrásøgn verður sent nevndini fyri IRF og øllum limakommununum.



UTTAN ÚR HEIMI

# Flogfarið hevði skeivt nummar

**Illgruni er um, at onkur hevði broytt verksmiðjunummarið á flogfarinum, sum datt niður í Reyða Havið jóladag.**

FLOGVANLUKKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Upplýsingar frá libanska ríkisákæranum benda nú á, at alt ruggaði ikki rætt við flogfarinum, sum datt niður í reyða Havið uttan fyri høvuðsstaðin í Benin, Contonu, jóladag.

Flogfarið skuldi úr egyptiska býnum Sharm el Sheik til Beirut í Libanon. Ríkisákærin har, Adnan Adoum, segði í gjár, at verksmiðjunummarið, sum stendur á einum av teimum funnu vrakpettunum, er ikki tað, sum skuldi staðið á vanlukkuflogfarinum. Tí er tað ikki óhugsandi, at onkur hevur tikið nummarið av einum øðrum flogfari og sett tað á vanlukkuflogfarið, fyri at tað skuldi fáa loyvi at seta seg í Beirut, segði hann.

Egyptiska felagið, sum átti flogfarið, ber orð fyri at fara lætt um trygdina, og av tí sama sleppur felagið ikki at flúgva í sveitsiskum loftrúmi.

Vanlukkan jóladag kravdi 141 mannalív.

# Elisabeth doypti Mary




*Nógv varð gjørt burturúr, tá Elisabeth drotning fyrradagin gav heimsins største ferðamannaskipið navnið "Quenn Mary 2". Skipið er 150.000 tons stórt. Tað tekur 2.600 ferðafólk, og manningin telur 1.250. Tað er kenda enska reiðaríið Cunard Line, sum eigur "Queen Mary 2", ið hevur kostað góðar seks milliardir krónur at byggja. Á myndini síggjast m. a. Elisabeth drotning og skiparin á nýggja skipinum, Ronald Warwick*

# Amerikanarar skulu upp á Mars

**– Tað er ikki nóg mikið at senda eitt ómannað far upp á Mars. Vit skulu hava fólk upp hagar, og vit skulu hava eina støð har, sigur George W. Bush, forseti**

RÚMDIN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í næstu viku fer George W. Bush, forseti, at kunngera eina nýggja amerikanska rúmdarætlan. Hann hevur gjørt av, at USA skal senda fólk upp á gongustjørnuna Mars, og at USA skal hava eina støð har.

Tað er greitt, at ein slík ætlan verður ikki framd í bræði, og tí roknar forsetin við, at tað fyrsta mannaða amerikanska rúmdarfarið kann seta seg á Mars um eini tíggju ár.

Amerikanskir tænastumenn siga, at stjórnin ætlar at seta ferð á amerikonsku rúmdarkanningarnar, sum hava verið fyri fleiri álvarssomum bakkøstum í seinastuni. Eitt nú doyðu sjey fólk í februar í fjør, tá ein rúmdarferja sprongdist, beint áðrenn hon skuldi seta seg.

Í hesum døgum fyrireikar amerikanska kanningarfarið "Spirit" seg til at kanna skorpuna á Mars, og seinni í mánaðinum lendir enn eitt amerikanskt kanningarfar á reyðu gongustjørnuni.

## Eingin meiriluti longur

Var val til danska Fólkatingið í dag, hevði stjórnin hjá Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra mist meirilutan.

Ein kanning, sum stovnurin Greens hevur gjørt fyri blaðið Børsen, vísir, at teir báðir stjórnarflokkarnir og stuðulsflokkur teirra, Danski Fólkaflokkurin, høvdu fingið 86 tinglimir, var val nú. Andstøðan hevði haraftur ímóti fyri 89 umboð í Fólkatingið. Tað merkir so eisini, at tey fýra umboðini úr Føroyum og Grønlandi kundu gjørt av, hvør skal skipa stjórn í Danmark.

Hetta er fyrstu ferð síðani fólkatingsvalið í 2001, at formaðurin hjá Sosialdemokratunum, Mogens Lykketoft, kann rósa sær av at hava fleiri veljarar aftan fyri seg sum forsætisráðharri enn sitandi forsætisráðharrin. Tað gongur eisini væl hjá flokki hansara. Kanningin gevur Sosialdemokratunum 31,1 prosent av atkvøðunum, meðan Vinstriflokkurin hjá Anders Fogh Rasmussen fær 27,1 prosent. Hjá Sosialdemokratunum er talan um tvey prosentstig í framgongd. Hjá Vinstra er talan um fýra prosentstig í afturgongd.

## Indiánar gera uppreistur

Fleiri túsund indiánar, sum eru vápnaðir við boga og ørvi, hava tikið ræðið á nøkrum stórum bóndagørðum har suðuri í Brasil.

Talsmaðurin hjá brasilsku indiánunum, Adao Irapiuta, sigur, at indiánarnir vilja hava sína egnu jørð at dyrka. Hann vísir á, at stjórnin hjá Lula, forseta hevur lovað indiánunum jørð, men at einki er hent enn. Indiánarnir vísa á, at forfedrar teirra áttu hesa jørðina, men at hon varð tikin frá teimum. Nú vilja eftirkomararnir hava jørðina aftur.

Teir hvítu stórbøndurnir leggja indiánarnar undir harðskap. Teir siga, at indiánarnir hava dripið nógv húsdjór hjá bøndrunum, og teir krevja, at løgreglan leggur uppí og rekur indiánarnar burtur. Lula, forseti, sigur, at hann heldur fast um ætlanina at geva indiánunum ein part av brasilsku landbúnaðarjørðini. Hann hevur eisini lovað teimum størri rættindi og betri sosial kor.

## 10.000 er nóg mikið

Í gjár kom álitið um, hvussu kommunurnar í Danmark skulu skipast í framtíðini, og sum vænta mælti nevndin til, at kommunur helst skulu hava í minsta lagi 30.000 fólk.

Men tað eru minni enn so øll, sum eru so fegin um hugskotið, tí tað fer at gera, at nógv tær flestu kommunurnar í Danmark verða strikaðar av kortinum, tí tær mugu leggjast saman við øðrum kommunum. Ein av mótstøðumonnunum er formaðurin í danska kommunufelagnum, Eigil W. Rasmussen. Hann heldur, at tað ber væl til at lækka minstamarkið til 10.000 fólk.

– Sjálvt um kommunurnar fáa fleiri uppgávur í framtíðini innan eitt nú serundirvísing, heilsu og arbeiðsmarknað, kann ein kommuna við 10.000 fólkum megna uppgávurnar, sigur hann. Sjálvur er Eigil W. Rasmussen borgarstjóri í jútsku kommununi Gedved. Har búgva 10.070 fólk!

## Madonna eftir Bush

Tann 45 ára gamla poppstjørnan Madonna hevur nú lagt seg út í valstríðið upp undir amerikanska forsetavalið í heyst.

Í einum brævi leggur Madonna eftir stjórnini hjá George W. Bush, forseta. Hon heldur, at forsetin hevur latið fleiri møguleikar at skapa frið í krígsherjaðum økjum fara aftur við borðinum. Hon sigur eisini, at yvirgangur ella Irak er ikki tann størsta hóttanin ímóti USA. Tann størsta hóttanin er at hava eina stjórn, sum mistekur seg, sum ikki er heiðurlig, og sum er fullkomiliga samvitskuleys, skrivar Madonna.

Sjálvur mælir hon amerikonsku veljarunum til at velja demokratiska valevnið Wesley Clark til forseta í heyst. Hon sigur, at fyrrverandi NATO-ovastin er maðurin, sum kann beina USA aftur á rætta kós.